

(Mynd: Jens Kristian Vang)

# Spennandi summar hjá Sjóborg

Snorri Brend

08.05.2014 - 10:28

Oljan.fo

Tað var ein serstøk og spennandi sjón, sum møtti fólki í havnalagnum í Runavík fyrrapartin í gjár.

Á fyrsta sinni, síðani skipið varð bygt í Norra í 2012, er frálandaskipið Sjóborg hjá Skansi Offshore nú í Føroyum.

Sjóborg ger nú klárt at taka útgerð til boripallin West Hercules, sum kemur í føroyskan sjógv ein av komandi døgunum.

Sjóborg verður so ein av mongu føroysku veitarunum, sum skal hjálpa Statoil og partnarum at finna føroysku oljuna og gassið, sum eftir øllum at døma liggur goymt í undirgrundini, skrivar oljan.fo.

**Myndamaður okkara – Jens Kristian Vang – var umborð á Sjóborg í gjár, og tók hesar myndir:**


















